HARD FUN REAL LIFE

Multimedia Designer



www.noma.nu

NOMA
NORDIC MULTIMEDIA ACADEMY
Skovvangen 28 - DK 6000 Kolding
+45 79 320 200 - contact@noma.nu

## Heimarøktin í Suðurstreymoy søkir

# Summarfrítíðar-avloysarar

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar frá 15. juni til 31. august 2005 at arbeiða í Heimarøktini í skiftandi vaktum og 3. hvørt vikuskifti.

Heimarøktin veitir tænastur dagliga millum kl. 8.00 og 23.30. Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 317249 kl. 9.00-11.00.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og upplýsingum um arbeiðsroyndir og upplýsingar um ynskiligar arbeiðstíðir skulu stílast og sendast til

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Att.: Økisleiðarin Anna Maria Oskarsson
Skálatrøð 14,
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 20. apríl 2005.

# Kunngerð um ognartøku

Við hesum verður kunngjørt sambært reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, at Klaksvíkar Býráð á fundi 1. mars 2005 hevur samtykt at ognartaka neyðugt lendi til vegagerð millum vegin »Undir Fossum« og »Oman Eið« í Klaksvík. Ognartøkan umfatar part av hesum matriklum: 854,830a,650a,650d,788a,827a,715a,797,836,874 a,823,702a,810,841,697a,632a,740,739a,843, 719a,738a, 845,805 og 795 í Klaksvík.

Ognartøkan liggur frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni inntil 22. apríl 2005 og skulu møguligar kærur verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2005.

Klaksvík 1.apríl 2005
**Klaksvíkar Býráð**

## Sandoyar sýslu Javnaðarfelag

Lýsti aðalfundurin verður í Samljóð fríggjakvøldið 8. apríl kl. 20.00.

Við á fundinum verða løgmaður Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður Hans Pauli Strøm, Hendrik Old og Gerhard Lognberg løgtingsmenn.

Aftaná verður okkurt til matna, felagssangur, tónleikur og burturluting.

**Nevndin**

## Glastrevjabátur uttan fiskiloyvi til sølu

Báturin er útgjørdur við allari nútímans nautiskari útgerð, 'kortplottara. radar, ekkolodd, G.P.S og autopilot.

Báturin er merktur 9,2 bruttotons og er 30 fót til longdar. Maskinan er ein C.A.T 130 hk. og ferðin er uml. 7-8 knob.

Báturin er í sera góðum standi, og er hann sera væleagnaður til rúsufiskiskap. Nakað av gogguúsum fylgja við.

**Áhugaði kunnu venda sær til tlf. 229275**

# TIL LEIGU

Í KFUM-bygninginum við Hoydalsvegin eru høli til leigu, ið eru 70 fermetrar til støddar, harav hjárúm 20 fermetrar.

Við góðum parkeringsmøguleikum eru hølini væl hóskandi til skrivstovu ella annað virksemi. Hølini, sum eru í veghædd, liggja væl fyri, við SMS sum nærmasta granna.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til KFUM á tel 21 18 24.

Áhugað kunnu seta seg í samband við KFUM á tel 21 18 24 ella gjøgnum teldupost á kfum@kallnet.fo við nærri ætlanum.

KFUM
Postboks 86
FO 110 Tórshavn
kfum@kallnet.fo

# Bahá'i Miðstøðin

## Opið hús

Fríggjadagin 8. apríl 2005 kl. 20.00
Øll eru vælkomin

Elskar tú meg, vend tær so burtur frá tær sjálvum; og søkir tú fragd mína, lít so ikki at tínari egnu, at tú kanst doyggja í mær og eg æviga kann liva í tær.

*Bahá'ulláh*

# Koyri-kort?

Teoriskeið til persónbil byrjar **mánadagin 11.04 kl. 17** og til motorsúkklu **týsdagin 12.04 kl. 19.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
tel 21 10 99 • 21 10 96

**John A. Christiansen**
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

veitst tú ikki tað?

**Lesið internet Sosialin !**



# Til sølu

Hugsar tú um ellisakfar…?

Ein Nissan Bluebird 1.6 model T12 til sølu.

Bilurin er frá 1986 – og einans koyrt 60.000 km.

Bert ein eigari

**Ring 455901, best um kvøldið**

# Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo